EF-villeiðingar Edmund Joensens

Sálvt um øll tey smæstu londini í Europa og so at siga øll tey smáu økini í Europa, sum hava nakað sjálvræði, hava valt at vera uttan fyri EF av politiskum og økonomiskum grundum og hava gjørt sínámillum sáttmálar við EF, so strongir Føroya Sambandsflokkur við formanninum Edmundi Joensen á odda á, fyri at fáa Føroyar lagnaðar inn í EF beinanvegin. Argumentið fyri innliman í EF er bert eittans: Virkan av triðjalandsfiski til at útflyta til EF.

Men boðskapur Edmund Joensens til Føroya fólk, at so skjótt vit fara upp í EF, so fara øll flakavirkini í gongd við at virka triðjalands fisk; arbeiðsloysistalpulleikarnir verða lægstir og eisini samfelagskreppan í síni heild, er rein villleiðing.

Lat meg í stuttum greiða frá nøkrum av tí, sum Edmundi Joensen ikki »hugar« at greiða Føroya fólki frá viðvíkjandi triðjalandsfiskinum.

Triðjalandstollurin

Lond uttan fyri EF gjalda triðjalandstoll av tí lidnu vøruni við sølu til EF, t.v.s. toll av rávøru + góðsking.

Lond innan fyri EF gjalda triðjalandstoll við keypi av rávøru.

Tollmunurin millum at vera uttan- ella innanfyri EF er altso tollurin av góðskingini. Við tað at tolsatsirnir á rávørunum generelt eru eitt sindur lægri enn á lidnu vørunum, er hetta tilnærmilsisvís galdandi.

Góðska vit til dømis frystan avhøvdaðan tosk, so kann roknistykkið vera nøkurlunda soleiðis:

Úr 2 kg av toski á 14 kr/kg = 28 kr. fæst 1 kg liðug vøra = 40 kr. Virðið av góðskingini er 12 kr/kg lidna vøru = 6 kr/kg rávøru.

Triðjalandstollurin av hesi góðsking verður umleið 1 kr/kg rávøru. Hetta er tað, vit vildu vunnið við at verið limir í EF. Hetta er ca-tøl.

Fyri ávísar vørubólkar, sum hoyra til ávsar kvotur er triðjalandstollurin uppaftur nógv lægri, hann kann vera bert ¼ av nevndu tølunum.

Keypa vit t.d. 25.000 tons av toski, góðska hann og útflyta til EF fyri ½ milliard, so er triðjalandstollurin av góðskingini 25 mill. kr. sum svarar til tollfyrimunin vit vildu fingið við EF-limaskapi. Keypa vit 100.000 tons av toski, sum er ein sera stór nøgd, og selja liðugt-vøruna fyri 2 milliardir, so verður hetta tal 100 mill. kr.

Er virkan av triðjalands fiski so lønandi, so oyðileggja 25, 50 ella 100 milliónir ikki allar møguleikar fyri okkum, tá hetta bert er 5% av søluvirðinum.

Ein slík upphædd er als ikki avgerandi í einum samfelag, sum brúkar 3700 milliónir árliga. Eru hesar 25 milliónirnar einasti trupulleiki í sambandi við triðjalandsfiskin, kunnu vit søttliga byrja at góðska slíkan fisk beinanvegin. Tað er ikki neyðugt at melda seg inn í EF fyri at gera tað. Tað veit Edmund Joensen ógvuliga væl.

Einki veruligt argument fyri EF

Tað at brúka ein meirtll uppá 25, 50 ella 100 milliónir árliga sum altavgerandi og einasta argument fyri at lima Føroyar inn í EF við øllum tí, tað inniber, ja, tað er ørvitisskapur, og eisini háðan ímóti øllum føroyingum. Men samstundis eitt prógv um, at einki veruligt argument er fyri at fara upp í EF.

Harafturat: Hvussu trygg er henda vinna í framtíðini? Verður tað lønandi at arbeiða triðjalandsfisk um 3—5 ár? Verður henda vinna til tá? Slíkt aldar jú aftur og fram. Og fáa vit nakran fisk um 5 ár? Hvør kann garantera fyri tí? Ja, eg skal svara sjálvur: Ongin. Russararnir til dømis, sum skulu selja okkum frystan fisk, mangla arbeiðsplass og vestanvaluta. Tað kann verða so skjótt, at teir siga við okkum, at teir ynskja at góðska fiskin sjálvir fyri sjálvir at fáa meira burturúr.

Og afturat hesum: alt vit missa við EF-innliman, sum Edmund Joensen einki nevnir um.

Vit missa øgiligt við EF-innliman

Vit koma at missa politiskt og figgjarliga.

Fyrst og fremst missa vit møguleikan fyri at fáa meira sjálvræði, og tað avmarkaða sjálvræði, vit hava, missa vit. Vit fáa ongan umboðsmann í Bruxelles, so tað verða danskir embætismenn, sum fyri alla tíð skulu umboða okkum har.

Eg undrist á, hvørjir føroyingar veruliga halda hetta vera í lagi, tá vit júst í ár hava upplivað at 2 europeisk lond, sum bæði eru nógv inni enn Føroyar og ikki tala egið mál, hava fingið sæti í ST, og nú kunnu lata sína rødd hoyra í hesum stóra forum? Hví skulu vit gerast politiskt og nationalt púra anonymir — sum um vit ikki vóru til? Hvat er hetta fyri nakað?

Innan fiskivinnu og aling:

— alt føroyskt sjóøki, harí Føroyagrunnurin, gerst EF-heimasjógvur

— allur fiskivinnupolitikkur verður fluttur til Bruxelles

— alt føroyskt aliøki gerst EF aliøki

EF manglar fiskigrunnar

Um hetta sum omanfyri er sagt, kunnu greinar, ja heilar bøkur skrivast. Eg skal bert ávísa hetta:

EF nýtir 2 ferðir so nógvan fisk sum teirra egnu grunnar geva. T.v.s. teir mangla fiskigrunnar í ólukkumát og hava sostatt eitt motiv til at fáa Føroyagrunnin til EF-øki.

TAC-ini fyri øll fiskasløgini í EF-sjógvi eru sett, og øll EF-londini hava ov stóran fiskiflota og siga seg at sleppa at fiska alt ov lítið. Tað seinasta, vit hava hoyrt, er at EF hevur kravt, at danski fiskiflotin skal skerast niður við 25%. Tit, sum ynskja føroyska EF-innliman og siga, at vit sulu fáa meira í EF-sjógvi: Frá hvørjum skulu tit fáa tað? Hetta er ørvitistos — eisini um Henning Christoffersen sigur tað.

Grønland fór burtur úr EF

Eg vil í hesum sambandi minna á, at Grønland fyri nøkrum árum síðani var uppií EF, men fór burturúr, tí at EF-skip sorlaðu grunnar teirra sundur.

Missa undirgrundina í EF

Við EF-innliman missa vit undirgrundina eina ferð með alla. Allar kanningar av undirgrundini inntil nú týða uppá, at undirgrundin goymir veldugt oljuríkidømi. Virði fyri hundraðir, ja, møguliga túsundir av milliardum av krónum kunnu liggja har. Ja, liggja allarhelst har. So nógv liggur í hetlendsku undirgrundini. Og vit vita sikkurt, at olja er á Føroya Banka. Um vit koma at ráða yvir og stýra útvinningini av hesum virðum, sum er okkara sjálvsagdi rættur, so eru vit av heimsins ríkastu londum. Hesi virði kunnu vera so stór, at vit kunnu liva av teimum í fleiri ættarlið. Innan fyri EF fáa vit einki at siga yvir undirgrundini, og vit fáa minni enn 5% av virðunum. Profittturin fer aðrar vegir.

Eingin fíggjardepil í EF

Við EF-innliman missa vit møguleikan at gerast fíggjardepil. Hetta hevur givið smáum londum nógv arbeiði og stórar inntøkur. Og Føroyar eins væl og Ísland hevur longu nú fingið fyrispurningar hesum viðvíkjandi úr útlondum, eitt nú frá feløgum, sum nú arbeiða í Luxenbourg. Allarhelst tí roknað verður við, at hetta virksemi fer at verða steðgað ella gjørt sera trupult innan fyri EF. Møguleikarnir á hesum øki eru tí øktir nú.

Eingin innregistrering av skipum

Við EF-innliman missa vit møguleikan fyri at gerast eitt land, har stór lond, sum t.d. USA kunnu fara at innregistrera síni skip, sum føroyskir sjómenn so kunnu vera við til at manna og dríva.

Tey smæstu londini í Europa gera avtalur við EF og verða uttanfyri

Afturat tí, sum eg havi sagt, um hvat vit missa við EF-limaskapi, vil eg gjarna gera vart við hetta:

So at siga øll tey smæstu londini eins væl og tey flestu smáu økini í Europa við avmarkaðum sjálvstýri, hava valt at vera uttan fyri EF, tí tey missa ov nógv við at fara upp í — politiskt og økonomiskt. Hesi lond hava gjørt sínámillum avtalur við EF av ymiskum slag, sum gevur teimum møguleika at handla við EF.

Eg spyrji: Hví kunnu vit ikki fáa líknandi skipanir við EF? Hví fokusera vit bert uppá limaskap?

Hví skal land okkara avreiðast til EF, áðrenn vit fáa eina trygga mynd av teimum veldugu virðum, sum allarhelst finnast í undirgrund okkara? Hvat er motivið hjá Edmundi Joensen og sambandsflokkinum í teirra EF-herferð, og hvat ella hvør hevur sett teir í gongd?

Jóannes Eliasen



Dimmalætt

NR. 47 LEYGARDAGUR 25. APRIL 1992

Formaður Sambandsfloksins, Edmund Joensen:

Ikki nóg mikið við heimabeitispolitikki

Tað er uppgavan hjá politikkarum at syrgja fyri, at fyritreytirnar fyri einum góðum buskaparpolitikki eru í lagið – Og tað eru tær, um vit hava ein góðan uttanríkispolitikk, heldur Edmund Joensen, og mælir til at søkja um limaskap í EF – Ikki fyrr enn tá verður møguleiki fyri framburði í Føroyum og ikki fyrr enn tá, fer arbeiðsloysið at minka í Føroyum – Sum støðan er nú, situr landsstyrissamgongan sum ryssa uppi yvir deyðum fyli, starandi aðruhvørja ferð í ein skraillóttan landskassa og aðruhvørja ferð í pengamappu skattgjaldarans, sigur formaður Sambandsfloksins við Dimmalætting

Hollur ágóði

Fri kapping

Tvangsauktion

På Dommerkontoret, C. Pløyensgøta 1, Tórshavn, afholdes

Torsdag den 04. juni 1992 kl. 10.30

tvangsauktion (AS nr. 158/92) over matr. nr. 131 b, Lopra beliggende Lopra.

Auktionen er begæret af advokat Páll Nielsen, Advokatvirkið, Hoyvíksvegur 27, 100 Tórshavn tlf. 1.2171 j. nr. (2251006) på vegne en pant- og udlægshaver.

Ejendommen er et beboelseshus, på en 654 m² stor grund, i 3 etager.

Ejendommen kan beses efter aftale med ovennævnte advokat.

Auktionsdokumenterne ligger til gennemsyn på dommerkontoret.

Færøernes fogedret,
den 08.05.92
Ole G. Olesen
dfm.